## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av suðri og regn eitt skifti. Seinnapartin strúkur í vindi av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.



# Dýr halda fram á Akureyri

LISTAFRAMSÝNING
*Rúnar Reistrup*

Í hesum døgum er framsýning í Listagarði Akureyrar, har føroysku listakvinnurnar Astrid Andreasen, Guðrið Poulsen og Tita Winther luttaka.

Framsýningin eitur »13+3« og er eitt framhald av framsýningini »Dýr«, sum var at síggja í Grasagarði í Havn í fjør í sambandi við Listastevnu Føroya.

Tær tríggjar føroysku listakvinnurnar luttaka á framsýningini saman við 13 íslendskum listakvinnum, sum arbeiða við ymsum tilfari so sum tekstil, keramik, træ og mosaik. Tað er hendan samansetingin av trettan íslendskum og trimum føroyskum listakvinnum, ið hevur givið framsýningini sítt heiti.

Framsýningin í Listagarði Akureyrar er tann fyrsta í hesum botaniska gerðinum, ið varð grundlagdur í 1912. Hon hevur verið væl vitjað higartil og heldur fram til 14. september.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 16 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | 15 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 20 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 22 |
| New York | 22 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 997 hPa. vestan fyri Írland fer móti Íslandi og dýpist.




Lágtrýstið vestan fyri Írland fer móti Íslandi og dýpist og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarmorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/08 kl. 06[00]– 11/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 10/09 kl. 06[00]–11/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 17,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

10. sept.: Fullmáni
16. sept.: Mánin longst frá jørðini
18. sept.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. sep | 08.42 | 21.02 | 07.42 | 20.02 | 07.57 | 20.17 | 10.42 | 23.02 | 11.42 | — | 06.57 | 19.17 | 05.57 | 18.17 | 08.57 | 21.17 | 09.57 | 22.17 | 08.27 | 20.47 | 09.42 | 22.02 |
| 13. sep | 09.22 | 21.41 | 08.22 | 20.41 | 08.37 | 20.56 | 11.22 | 23.41 | 00.02 | 12.22 | 07.37 | 19.56 | 06.37 | 18.56 | 09.37 | 21.56 | 10.37 | 22.56 | 09.07 | 21.26 | 10.22 | 22.41 |
| 14. sep | 10.01 | 22.20 | 09.01 | 21.20 | 09.16 | 21.35 | — | 12.01 | 00.41 | 13.01 | 08.16 | 20.35 | 07.16 | 19.35 | 10.16 | 22.35 | 11.16 | 23.35 | 09.46 | 22.05 | 11.01 | 23.20 |
| 15. sep | 10.40 | 23.00 | 09.40 | 22.00 | 09.55 | 22.15 | 00.20 | 12.40 | 01.20 | 13.40 | 08.55 | 21.15 | 07.55 | 20.15 | 10.55 | 23.15 | 11.55 | — | 10.25 | 22.45 | 11.40 | — |

5 707265 100050 >